# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# BLÍÐKAR FYRI HUGAÐUM FÓLKUM



Tað eru skilagóðir tónar sum eru at hoyra av politiska vígvøllinum í løtuni. Mánadagin váttaði Høgni Hoydal, at Tjóðveldi hevur fundast við restina av samgonguni um at fáa nøkur týdningarmikil mál framd, heldur enn at sleppa landinum út í stjórnarloysi.

Høgni Hoydal sigur, at Tjóðveldi vil royna at gera nakrar langtíðarsemjur millum politiskar flokkar, sum skulu kunna halda – eisini aftan á eitt løgtingsval. Hetta skulu vera avtalur, sum verða gjørdar so bindandi, at flokkarnir mugu siga tær upp við serligari uppsagnarfreist, um tey broyta hugsan.

Hóast slíkar avtalur – ella *forlík*, sum tað verður kallað eitt nú í Danmark – eru púra vanligar í øðrum londum, so er hetta nakað heilt nýtt í føroyskum politikki. Hetta boðar frá góðum, tí um okkara kosnu menn og kvinnur klára at broyta arbeiðslagið á henda hátt, so er nógv vunnið.

Vit hava sæð so nógvar semjur og so nógv samgonguskjøl, sum ikki eru verd tað pappír, tey eru skrivað á. Vit kunnu bara taka øll vallyftini undan seinasta løgtingsvali – tey eru so langt frá dagsins politiska veruleika, at vit í veruleikanum ikki eiga at taka hesi fólkini fyri fult.

Sjálvt um tað bara skuldi manglað, so er tað djarvt at Tjóðveldinum at melda soleiðis út. Tað er sera skilagott og tekin um gott politiskt tev, at ein flokkur sum Tjóðveldi kann lyfta seg upp um vanliga smáligheitspolitikkin, sum bara gongur út upp á hjá einum andstøðuflokki at fella tað til eina og hvørja tíð sitandi stjórn. Tað tykist ikki vera ætlanin hjá Tjóðveldinum.

Harafturat kann veljarin við slíkum langtíðarsemjum síggja, hvørja politiska leið hann skal velja, og hvat tað merkir, um hann velur hendan ella handan flokkin. Tosað hevur verið um blokkpolitikk, hetta hevur nakað við tað at gera. Tí verða komandi dagarnir sera týdningarmiklir fyri politisku framtíðina. Og tað er ikki tí, at tað av tilvild er ein sambandsmaður sum er løgmaður, ella tí at Javnaðarflokkurin er í samgongu. Men tí, at tað sær út til, at vit nú fara at síggja nøkur politisk avrik, sum fleiri flokkar í felag kunnu standa saman um, og sum tí fleiri fólk kunnu kenna sín ognarlut í. Tað er tað, sum hevur manglað í føroyskum politikki – altíð!

Um hetta verður loysnin, so hevur hetta nógv størri týdning, enn at loysa stjórnarskipanarligu trætuna, sum hevur hildið føroyskum politikki niðri í móruni í fleiri enn hundrað ár.

**Tað boðar frá góðum, at flokkar gera bindandi avtalur**

## Sjálvandi skulu vit læra danskt

Um dagarnar kom fram, at ætlanin er broyta undirvísingina í donskum í miðnámsskúlum soleiðis, at lærugreinin ikki longur verður ein kravd lærugrein. Orsøkin er, at hægri danskir lærustovnar ikki longur hava sum krav, at føroyingar skulu hava danskt á a-stigi frá miðnámsskúla.

Tá tað snýr seg um tað, sum danskt er í Føroyum, so hava vit tað við at fara í baklás. Í øllum føri vilja summi okkara fara aftur til jólafundin í 1888, tá Jóannes Bóndi læs yrkingina »Nú er tann stundin«, har hann yrkti um móðurmálið, sum hevði tað so ringt og leið undir donskum máli:

*»Hoyr, latum okkum tó mót*
*útlendskum ganga,*
*tað sláa undir vanga;*
*útnyrðingur skal tað av*
*landinum føra*
*– sum sápubløðru!«*

Men støðan er so nógv øðrvísi í dag. Tað er ikki danskt-undirvísingin í skúlanum, sum hóttir okkum málið. Tvørturímóti hevur danskt-undirvísingin positivt og konstruktivt árin á føroyska málið, og danskt er, um vit vilja tað ella ikki, brúgvin til lærdu skúlarnar, sum enn eru og framvegis vera fyrst og fremst í Danmark.

Sjálvsagt skulu vit hava dygga undirvísing í enskum, men enskt skal ikki taka yvir, tí vit ikki vilja læra danskt. Og at tosa um at læra nakað so óítøkiligt, sum norðurlendskt í staðin fyri danskt er í besta lagi heimføðislig undanførsla. Sjálvandi skulu vit læra danskt væl og virðiliga. Hini norðurlendsku málini kunnu vit so taka haganífrá.

## Øl er øl harra ÍSF forseti...



Í blaðnum í dag sigur Petur Elias Petersen, ÍSF forseti, at tað ikki er beinleiðis ósamsvar í tí, at HB lýsir við ølbryggjarínum Okkara á sínum búnum hjá Vodafone-liðnum.

Altso harra forseti... Tað er ÍSF, sum hevur fingið sær hatta bæriliga stevnumið, ikki at eggja ungum at drekka, og at úrmælingar í bestu deildunum skulu vera góðar fyrimyndir. Hvussu kann sjálvur ÍSF forsetin vera so fantasileysur?

Niðurstøðan má so bara vera, at meðan fransk-hotdog-brigadan hjá ÍSF berjist ímóti pylsum og feitum chipsi í ítróttarhallum, so heldur hægsta ítróttarleiðsla landsins tað vera í fínasta ordan at lýsa við rúsdrekka á fótbóltsvøllum.

Her lekur illa millum teori og praksis hjá ÍSF. Hetta virkar for býtt. Vil ÍSF hava fólk at taka undir við hasum frálíka heilsutiltakinum, so gerið tað heilhjartað – ella latið vera!



**Trygdargrunnur endurskoðast**

GEORG HANSEN
KJAK Á SÍÐU 13



**SEV – skynsemi sigrari**

HANS DÁVID DAM
KJAK Á SÍÐU 12



KRINGVARP FØROYA

TÍÐINDI & AKTUELT · ÍTRÓTTUR · MENTAN & UNDIRHALD · TÓNLEIKUR · ÁTRÚNAÐU

Tú ert her: Forsíða > Um KVF > Lýsing av KVF > Leys størv

**Um KVF**
Lýsing av KVF
Hugsjón
Søgan hjá KVF
Umsitingardeildin
Tíðindadeildin
Programmdeildin
Dokumentardeildin

**Leys størv**

**Størv á tíðindadeildini**

*(Heinta hesa starvslýsing sum PDF-fílu ).*

Tvey av okkara starvsfólkum eru farin aðrar leiðir, og tí søkja vit eftir tv
seta í føst størv á tíðindadeildini tann 1. juni 2011. Eisini tørvar tíðinda
til tíðaravmarkað størv í tíðarbilinum 1. juni til 31. desember 2011.

## Kreativt ella ólógligt Kringvarp?

Tað er bara ein heimasíða í Føroyum, sum ikki hevur loyvi at hava lýsingar. Tað er heimasíðan hjá Kringvarpi Føroya.

Politikararnir høvdu eftir øllum at døma so ringa samvitsku av, at Kringvarpið nýtir lógarkravdar almennar pengar at kappast ímóti privatu miðlunum, at tá møguleikin var eisini at lýsa á internetinum, so slapp Kringvarpið ikki tað.

Men tað hevur kortini ikki so nógv upp á seg. Meðan Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya í sínari tíð lýstu størv leys í bløðnum, eins og flestu aðrir almennir stovnar, so lýsir Kringvarp Føroya síni leysu størv – einans – á einastu heimasíðu í landinum, sum ikki hevur lov at hava lýsingar.

Men tað ger jú einki, tí einki hendir kortini. Man hetta so vera ein byrjan upp á at útvega Kringvaprinum internetlýsingar? – og tá tað hevur gingið eina tíð, so tora politikararnir einki at gera kortini. Enn hava vit ikki sæð eitt landsstýrisfólk í mentamálum, sum erført fyri at skapa Kringvarpinum sømulig kor, so tey sleppa undan kreativum loysnum til tess at útvega stovninum pengar.

Vit skulu hava eitt gott alment kringvarp. Men tað fáa vit bara við at gjalda tað, sum tað kostar, og tað er uppgávan hjá politikarum. Alt annað er at blæsa og hava mjøl í munninum.

**Sosialurin**
Tel. 341800
www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja*
*tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*